ítróttur

Nr. 226 • hósdagur • 27. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-Søljan 18-17 (8-12):

# Javnstøða í botninum



*Tá Kyndil frá byrjan av seinna hálvleiki fór undir mansverju av Nicoletu Radu, kom fullkomuliga stígur í hjá gestunum úr Søljuni*

**Hóast tað leingi sá svart út, so fekk Kyndil strítt seg til sigurs týskvøldið, og við hesum eru tær ikki longur púra einsamallar í botninum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kyndil var bara tvær ferðir á odda í dystinum móti Søljuni týskvøldið. Seinnu ferðina, tá Annika Thomsen fekk smekkað bóltin inn við nærmara stólpa góð bert 15 sekund fyri leiklok, og tað var so eisini nóg mikið hjá henni og liðfeløgunum at ogna sær týdningarmiklu stigini í botnuppgerðini móti Søljuni.

## Tóktist mótleysar

Soleiðis ognaðu Kyndilskvinnurnar sær fyrstu stigini á árinum, men tað gekk rúm tíð, áðrenn nøkur ábending kom um, at hetta skuldi gerast støðan við dystarlok.

Tað var nevnliga Søljan, sum fekk betru byrjanina í dystinum. Hóast Kyndil tóktist hava tikið við læru av tapinum á Giljanesi, har tær snøgt sagt vórðu rendar umkoll, so megnaðu gulu mótstøðukvinnurnar at halda eini hampuliga greiðari yvirvág í spælinum. Sum ikki einaferð, so var Nicoleta Radu krumtappurin í hesum, men fleiri av liðfeløgunum hennara tóktust eisini hava gott mót til uppgerðina, og í einstøkum førum var talan um heilt góðar kombinatiónir, sum førdi til, at leikarar gjørdust púrasta leysar.

Hinvegin var ikki sama bit í verjupartinum hjá Søljuni. Hóast Kyndil sjáldan megnaði at spæla verjuna hja´Søljuni tunna, so fingu tær fleiri ferðir roynt seg við skoti móti málinum. Og at sami leikari tríggjar ferðir á rað slapp at smekka standandi skot av trimum metrum í kassan, mundi ikki vera tað, sum tær høvdu ætlað undan dystinum.

Sum frá leið, so fekk Søljan eisini betri fatur á hesum partinum av spælinum. Nøkur skjótálop fingust eisini í lag, og so við og við tóktist næsti sigurin á árinum at koma alsamt nærri.

Seinastu løtuna undan steðginum tóktist tær á heimaliðnum fullkomuliga at hava mist mótið, og havandi í huga tungu gongdina, sum liðnum hevur verið fyri í ár, so tóktist tað sera ivasamt, um Kyndil megnaði at venda hesum.

## Mansverjan avgjørdi

At tað so kortini bar til, komst serliga av tveimum orsøkum. Onnur var, at Grønu leikararnir tóktust hava sett sær fyri í steðginum, at her skuldi einki gevast burtur. Og hin – og hon var kanska týdningarmiklari – var, at tær nú fóru undir mansverju av Nicoletu.

Hjá Søljuni merkti hetta, at spælið steðgaði at kalla heilt upp. Uttan vanliga skiparan megnaðu tær als ikki at fáa glið á nakað sum helst, og tá tær heldur ikki tóktust hava nakað móttrekk móti mansverjuni, noyddist Nicoleta fyri tað nógva bara at standa bíðandi uppi á miðlinjuni. Nakrar ferðir royndi hon tó at skræða seg leysa, men hóast hon fekk langt tjóður frá dómarunum til hetta, so var tað sjáldan, at úrslitið av hesum var somikið munagott, at tað spegladist aftur á máltalvuni.

Hjá Kyndli gekk kanska framvegis striltið at koma ígjøgnum vágaverjuna, men tær høvdu tó eitt vápn, sum í stóran mun bøtti um hetta. Lotte Sørensen hevur millum lítið og einki spælt í ár, eftir at nústaðni er um at koma fyri seg eftir skaða. Ofta er tað kanska misjavnt, hvørja ávirkan hon hevur á viðleikararnar, men hesaferð sýndi hon seg tó frá síni heilt góðu síðu. Høvdu mongu fríspælingar hennara verið betri gagnnýttar, hevði Kyndil ivaleyst vunnið ein tryggari sigur enn tað sama, men móti dystarenda tók hon alt meira á egnar herar, og hetta gav eisini úrslit. Hóast hon ikki telist millum tær kvikastu, so eydnaðist fleiri ferðir at finta seg fram til skotmøguleikar, og fær hon tíð og pláss, so sita skotini aloftast væl plaserað.

Sum frá leið, so fekk Kyndil eisini samband við Søljuna. Eitt skifti var lítki til, at báðir partar fullkomuliga steðgaðu upp, tá einki mál kom í einar 10 minuttir, men so kom aftur glið á. Søljan megnaði tó aftur at leggja seg á odda 17-16, men so var liðugt. Kyndil átti tey bæði seinastu málini, og so var liðugt. Tær grønu kundu jublandi staðfesta, at bjargingin hóast alt ikki so ræðuliga langt burturi, og tó at langt ífrá alt stríðið er tapt, so vistu gestirnir, at tær við hesum høvdu mist ein gyltan møguleika at leggja sjógv niður til botnin.

## Dysturin í tølum

**Kyndil-Søljan 18-17**
**(8-12)**

Málskjúttar

Kyndil: Ann Mari Wang 5(2), Lotte Sørensen 4, Annika Thomsen 3, Anja Heinadóttir 2, Hildur Mikkelsen 2, Anita Kjærbo 1, Randi Wardum 1

Søljan: Heidi Maria Akselsen 6, Nicoleta Radu 5, Hertha Simonsen 2, Arnleyg Haraldsen 1, Petra Thomassen 1, Heidi Haraldsen 1, Jana Jacobsen 1

Brotskøst: Kyndil 4, Søljan 3

Útvísingar: Kyndil 1, Søljan 4

Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen. Lótu til tíðir ov nógv um seg ganga, men hinvegin var dysturin av slíkum slag, at hann skjótt kundi verið floytaður sundur og saman.





# FM hjá yngru telvarunum



*Í C-bólkinum hevur Helgi Ziska staðið seg best higartil*



*Men hann kann rokna við at fáa harða kapping frá Rógva Dragaberg*

**Kappingin um føroyameistaraheitið er samstundis úttøkukapping til NM-kappingina fyri børn og ung 2003**

TALV
*Tíðindaskriv frá Talvsambandinum*

Talvsamband Føroya skipar fyri FM-finalu í talvi fyri børn og ung í Argja skúla, leygardagin 29. november 2003. Byrjað verður kl. 10.30 og væntandi verður síðani dysta til á leið kl. 18.00

Kappingin er skipað í 5 bólkum:
A - bólkur: Telvarar føddir 1984-86
B - bólkur: Telvarar føddir 1987-88
C - bólkur: Telvarar føddir 1989-90
D - bólkur: Telvarar føddir 1991-92 og
E - bólkur: Telvarar føddir 1993 og seinni.

Í finaluni luttaka 8 í hvørjum aldursbólki og allir telva í móti hvørjum øðrum - t.v.s. 7 umfør. Umhugsunartíðin er 1/2 tími í part til hvør talvið.

Úttøkukappingar til finaluna hava verið í november mánað í Gøtu og Tórshavn. 8 telvarar í hvørjum bólki, sum samanlagt hava klárað seg best í hesum báðum kappingum, hava kvalifiserað seg til finaluna. Í hvørjari úttøkukapping luttóku uml. 100 børn og ung.

Í bólkunum B - E gerst vinnarin í finaluni Atlantic Airways føroyameistari í talvi 2003 í sínum aldursbólki.

Umframt at gerast føroyameistari luttekur viðkomandi í Norðurlandameistaraskapinum í skúlatelving, sum í ár verður í Karlstad í Svøríki í februar mánað 2004. Nummar 2 í hvørjum bólki luttekur somuleiðis í NM-kappingini. T.v.s. at Talvsambandið/Føroyar luttekur við 10 telvarum - luttøkutalið er sostatt ájavnt tí onnur norðurlond luttaka við. Norðurlond skiftast um at halda kappingina. Í februar mánað 2003 var kappingin í Føroyum.

Serlig viðurskifti gera seg galdandi fyri bólk A. Her er bert talan um úttøkukapping og ikki føroyameistarakapping. Úttøkukappingar hava ikki verið fyri hendan bólkin. Í staðin fyri verður bert finala telvað. Í finaluni kvalifiserar vinnarin seg til komandi NM-kappingina. Saman við vinnaranum luttekur føroyameistarin Martin Poulsen somuleiðis í Svøríki í februar 2004.

Talvsambandið skipar fyri miðvísari venjing í desember/januar mánað fyri teimum sum leika seg til NM. Venjarar vera Hans Kristian Simonsen (føroyameistari 2002) og Haldur Suni Johansen.

Niðanfyri er yvirlit yvir luttakararnar í hvørjum einstøkum bólki, eins og nakrar viðmerkingar eru gjørdar.

## A - bólkur: Telvarar føddir 1984-86

Sum nevnt hava úttøkukappingar ikki verið í hesum bólkinum. Í skrivandi stund er ikki greitt hvør fer at luttaka í finaluni. Tilmeldingarfreistin til kappingina er hósdagin 27. november. Kappingin um hetta eina plássið kann væntast at fara at standa ímillum Olaf Berg (Havnar Telvingarfelag), sum er rættiliga sterkur telvari (hevur luttikið í NM fleiri ferðir) og Rana Baldurson (Klaksvíkar Talvfelag), verandi unglingaføroyameistari og Sjúrð Thorsteinsson. Sjúrður er av Tvøroyri og er ikki knýttur at nøkrum talvfelag. Virkin talvfeløg hava ikki verið í Suðuroynni seinnu árini.

## B - bólkur: Telvarar føddir 1987-88

Luttakarar

| Telvari | felag | stig |
|---|---|---|
| Rógvi Mortensen | HT | 14,5 |
| Henry Berg | HT | 11,0 |
| Jón Gregersen | ST | 10,5 |
| Heri Thomsen | GT | 10,5 |
| Ingi W. Joensen | MT | 10,0 |
| Fríbjartur Dahl Olsen | HT | 9,0 |
| Sam Jacobsen | GT | 8,5 |
| Hávardur Olsen | | 6,5 |

Rógvi Mortensen úr Havnar Telvingarfelag vann undankappingarnar sannførandi. Telvað eru samanlagt 16 talv og hevur hann fingið 14,5 stig. Heri Thomsen (Gøtu Talvfelag) vann fyrstu kappingina, men snávaði í aðru kappingini og endaði á 10. plássinum. Heri og Rógvi luttóku í seinastu NM-kappingini. Rógvi er helst favorittur, meðan spenningur kann gerast um annað plássið í bólkinum.

## C - bólkur: Telvarar føddir 1989-90

Luttakarar

| Telvari | felag | stig |
|---|---|---|
| Helgi D. Ziska | HT | 15,5 |
| Rógvi Dragaberg | KTF | 13,5 |
| Berint Kalsø | KTF | 11,0 |
| Reidar Egilsnes | VT | 10,0 |
| Cristoffur Dam | | 9,5 |
| Andreas Nielsen | ST | 9,0 |
| Herborg Hansen | KTF | 9,0 |
| Andras Mikkelsen | GT | 9,0 |

Helgi D. Ziska hevur vunnið undankappingar rættiliga sannførandi - hevur ikki tapt eitt einasta talv - vunnið 15 út av 16 og telvað ein javnleik. Helgi er sonur Andrias Ziska (fyrrv. Føroyameistara í talvi). Rógvi Dragaberg úr Klaksvíkar Talvfelag er á greiðum øðrum plássi, meðan á 3 plássinum í báðum kappingunum og samanlagt er Berint Kalsø eisini úr Klaksvíkar Talvfelag. Rógvi Dragaberg er bróður Rúna Dragaberg, unglingaføroyarmeistara 2002. Væntast kann at hesir 3 fara at dystast um Meistaraheitið og NM-plássini.

Helgi luttók í seinastu NM-kappingini.

## D - bólkur: Telvarar føddir 1991-92

Luttakarar

| Telvari | felag | stig |
|---|---|---|
| Rógvi Nielsen | ST | 14,0 |
| Eilif Arge | KTF | 12,0 |
| Margar Berg | HT | 11,5 |
| Jaspur Enghamar | HT | 11,0 |
| Høgni Svabo | MT | 11,0 |
| Andrias W. Danielsen | TT | 10,5 |
| Bogi Hansen | KTF | 10,5 |
| Hjalti Jógvansson | | 9,5 |

Rógvi Nielsen úr Sandavágs Talvfelag vann báðar undankappingarnar og má metast at verða ein av favorittunum í finaluni. Tó kann sigast at telvararnir í bólkinum í síni heild er rættiliga javnir. Nevnast kann at í kappingini í Tórshavn var bert eitt _ stig á muni ímillum nr. 1 og nr. 9. Rógvi Nielsen, Hjalti T. Jógvansson og Margar Berg luttóku í seinastu NM-kappingini. Rógvi Nielsen er sonur navnframa Torkil Nielsen, fyrrv. Føroyameistara í talvi. Margar Berg úr Havnar Telvingarfelag er bróður Olaf Berg í A-bólkinum.

## E - bólkur: Telvarar føddir 1993 og seinni

Luttakarar

| Telvari | felag | stig |
|---|---|---|
| Olaf R. Samuelsen | HT | 13,5 |
| Rúni Vørmadal | VT | 13,0 |
| Heiðrikur Jacobsen | HT | 12,5 |
| Johann Vørmadal | VT | 12,0 |
| Magnus Dánjalson | KTF | 11,0 |
| Marni Kruse | | 10,0 |
| Róar Dam | HT | 9,5 |
| Høgni E. Nielsen | ST | 9,0 |

E-bólkurin umboðar yngstu telvararnar. Undankappingarnar bera boð um at bólkurin er sera javnur. Ongin av telvarunum hevur luttikið í NM áður. Tó var um reppið at Heiðrikur Jacobsen úr Havnar Talvfelag megnaði tað seinast úttøka var. Vørmadalbrøðurnir úr Vestmanna Talvfelag eru stinnir, einsog Olaf Samuelsen úr Havnar Talvfelag hevur tikið fleiri á bóli í undankappingunum. Tann bert 7 ára gamli Høgni E. Nielsen, úr Sandavágs Talvfelag, megnaði í kapping við fleiri aðrar júst at koma inn á 8. plássið. Hann er bróður Rógva Nielsen í D-bólkinum.